P/F BankNordik
Att: Stjórnarskrivstovan
Oknarvegur 5, Postboks 3048
FO-110 Tórshavn

28. februar 2019

**Uppskot til støðutakan á ársaðalfundi í P/F BankNordik's hin 21. mars 2019**

P/F BankNordik hevur boðað frá, at nevnd bankans á ársaðalfundi bankans hin 21. mars 2019 ynskir at leggja fram uppskot til broytingar í viðtøkum bankans.

Til tess at uppskot nevndarinnar um viðtøkubroytingar kunnu samtykkjast á aðalfundinum uttan at taka atlit til kravið um viðtøkuførið sambært grein 9.2 í viðtøkum bankans um at í minsta lagi 2/3 av partapeninginum er umboðaður á aðalfundinum, setur Fíggingargrunnirin frá 1992 hervið, við tilvísing til grein 9.3. í viðtøkum bankans, fram soljóðandi uppskot til støðutakan á ársaðalfundi hjá P/F BankNordik hin 21. mars 2019:

*"Fíggingargrunnurin frá 1992 skjýtur upp at vikið verður frá kravinum um viðtøkuføri sambært grein 9.2 í viðtøkum bankans, í sambandi við at ársaðalfundurin viðgerð uppskot nevndarinnar um at tillaga verandi orðing í grein 4.1. í viðtøkum bankans (uppskot nevndarinnar 6 b."*

Fíggingargrunnurin frá 1992

Ingibjørg Berg, Nevndarforkvinna

Nevndarlimur